# Public service-sáttmáli

millum

## Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið

tíðarskeiðið

1. januar 2011 til 31. desember 2013

Oktober 2010

# Innihaldsyvirlit


1 INNGANGUR ..... 3

2 LÓGARÁSETTAR PUBLIC SERVICE-SKYLDUR ..... 4

3 SÁTTMÁLAÁSETTAR PUBLIC SERVICE-SKYLDUR ..... 4

4 ENDAMÁLIÐ VIÐ PUBLIC SERVICE ..... 4

4.1 STYRKJA ÁHUGA BORGARANS AT VIRKA Í EINUM FÓLKARÆÐISLIGUM SAMFELAG ..... 5
4.2 MENNA FØROYSKA MÁLIÐ OG SAMLEIKA FØROYINGA ..... 5
4.3 STIMBRA MENTAN OG SKAPANAREVNI ..... 5
4.4 STIMBRA VITAN OG FATAN ..... 5

5 PUBLIC SERVICE-SKYLDUR ..... 6

5.1 ALMENNAR RAÐFESTINGAR, IÐ ERU GALDANDI FYRI ALLAR SENDINGAR ..... 6
*5.1.1 Samskifti við borgaran ..... 6*
*5.1.2 Føroyskt mál í Kringvarpi Føroya ..... 6*
*5.1.3 Týtt tilfar ..... 6*
*5.1.4 Alnets-tænastur ..... 6*
*5.1.5 Keypa tænastur ..... 7*
*5.1.6 Tilbúgving ..... 7*
*5.1.7 Førleikamenning og dygd ..... 7*
5.2 RAÐFESTINGAR INNAN ÁVÍSAR BÓLKAR AV SENDINGUM ..... 7
*5.2.1 Tíðindi og aktuelt ..... 7*
*5.2.2 Mentan ..... 7*
5.2.2.1 List ..... 7
5.2.2.2 Drama ..... 8
5.2.2.3 Bókmentir ..... 8
5.2.2.4 Undirhald ..... 8
*5.2.3 Átrúnaður ..... 8*
*5.2.4 Ítróttur ..... 8*
*5.2.5 Børn og ung ..... 8*
*5.2.6 Tónleikur ..... 9*
*5.2.7 Undirvísing ..... 9*
*5.2.8 Tænastur til fólk við breki ..... 9*
*5.2.9 Sendingar úti um landið ..... 9*

6 VERANDI INNTØKUSTØÐI OG RAÐFESTINGAR ..... 10

6.1 KOSTNAÐUR Í 2009 TIL AT FRAMLEIÐA SJÓNVARPSSENDINGAR ..... 10
6.2 KOSTNAÐUR Í 2009 TIL AT FRAMLEIÐA ÚTVARPSSENDINGAR ..... 10
6.3 VÆNTAÐ FRAMLEIÐSLA Í 2010 ..... 10
6.4 ÓBEINLEIÐIS ÚTREIÐSLUR ..... 11

7 ÚTLITINI FYRI ØKTUM INNTØKUM ..... 12

8 RAÐFESTINGAR, TREYTAÐAR AV HÆGRI INNTØKUM ..... 13

8.1 RAÐFESTINGARSKJAL ..... 13
8.2 VIÐMERKINGAR TIL RAÐFESTINGARSKJAL ..... 13
8.3 MIÐLASAVNIÐ ..... 13

9 ÁRLIG FRÁGREIÐING UM VIRKSEMIÐ SAMBÆRT SÁTTMÁLANUM ..... 14

10 RAÐFESTINGARSKJAL ..... 15

11 VIÐMERKINGAR TIL RAÐFESTINGARSKJAL ..... 16

# 1 Inngangur

Kringvarp Føroya hevur sum sjálvstøðugur, almennur stovnur ávísar public service-skyldur mótvegis øllum føroyingum.

Kringvarp Føroya hevur ein týðandi leiklut at miðla og mynda føroyska mentan. Stovnurin hevur somuleiðis stóran týdning fyri fólkaræðið í landinum, tí hann í virksemi sínum varpar ljós á og elvir til kjak um samfelagsviðurskifti. Fyri at tryggja, at Kringvarp Føroya røkir raðfestar public service-skyldur, gera Mentamálaráðið og Kringvarp Føroya henda sáttmála.

Kringvarp Føroya skal framleiða og senda dygdargott tilfar og á henda hátt virka fyri, at allir føroyingar gerast betur førir fyri at taka støðu til og ávirka samfelagsgongdina á ein fólkaræðisligan hátt. Hetta merkir, at stovnurin bindur seg til at tryggja eitt breitt útboð av sendingum og tænastum fyri alt Føroya fólk umvegis sjónvarp, útvarp, alnet og líknandi miðlar. Sendingarnar skulu m.a. fevna um tíðindaflutning, upplýsing, mentan og undirhald, herundir eisini sendingar til børn og ung.

Somuleiðis skal Kringvarp Føroya sum gluggi virka fyri, at føroyska tjóðin gerst betur før fyri at skilja heimssamfelagið og liva í og saman við tí. Eisini skulu altjóða ásetingar um eitt nú rættindi hjá teimum brekaðu og javnstøðuatlit í samfelagnum havast í huga í almenna kringvarpsvirk-seminum.

Public service-hugtakið er ovurhonds breitt, og tí er í lógini um Kringvarp Føroya heimilað lands-stýrismanninum, eftir orðaskifti í Løgtinginum, at undirskriva ein tíðaravmarkaðan public service-sáttmála við Kringvarp Føroya um at raðfesta og tryggja ávísar nærri allýstar public service-skyldur.

Inntøkurnar hjá Kringvarpi Føroya eru í ávísan mun tengdar at fíggjarligu gongdini í samfelagnum, og skuldi tað hent, at inntøkurnar lækka í sáttmálaskeiðnum, er tað ábyrgdin hjá stýrinum og stjóranum at tillaga virksemið so skynsamt sum gjørligt.

Partarnir hava í eina tíð tingast um, hvussu hesin fyrsti 3-ára sáttmálin skal verða orðaður og skipaður. Samanumtikið er breið semja millum partarnar um at raðfesta yvirskipaðu public service-skyldurnar, ið sáttmálin miðar eftir. Partarnir leggja dent á, at Kringvarp Føroya hevur ábyrgdina av skránni og frælsi til at leggja innihaldið til rættis.

Partarnir vóna, at hesin sáttmálin, ið fevnir um tíðarskeiðið 1. januar 2011 – 31. desember 2013, kann virka fyri, at Kringvarp Føroya fær eitt gott grundarlag til tess at røkja sínar public service-skyldur og fyri at virka í fólksins tænastu.

Tórshavn, 14. oktober 2010

| | |
|---|---|
| Rúni Heinesen<br>*stýrisformaður* | Helena Dam á Neystabø<br>*landsstýriskvinna* |
| Annika Mittún Jacobsen<br>*stjóri í Kringvarpi Føroya* | Martin Næs<br>*deildarstjóri* |

## 2 Lógarásettar public service-skyldur

Tær skyldur, sum Kringvarp Føroya hevur, eru yvirskipað ásettar í § 10 í kringvarpslógini. Skyldurnar eru breitt útgreinaðar, stovnurin skal leggja dent á eitt sakligt og óheft upplýsingarvirksemi og eitt fjøltáttað programmtilboð:

| |
|---|
| Kringvarp Føroya hevur skyldu til at útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Kringvarp Føroya skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.<br>*Stk. 2.* Kringvarp Føroya eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum. Kringvarp Føroya hevur skyldu at tryggja starvsfólkunum holla málsliga ráðgeving.<br>*Stk. 3.* Kringvarp Føroya skal ansa eftir, at sendingar ikki kunnu skaða likamligu, sálarligu og siðalagsligu menningina hjá børnum og ungum undir lógaldri, eitt nú við ónærisligum ella ógrundaðum harðligum innihaldi.<br>*Stk. 4.* Sendingarnar skulu ikki á nakran hátt elva til mannminkan, harðskap ella hatur orsakað av húðaliti, kyni, átrúnaði ella tjóðskapi.<br>*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at í sendivirkseminum skal serligt fyrilit vísast børnum og ungum.<br>*Stk. 6.* Virksemið hjá Kringvarpi Føroya kann eisini fevna um at endurvarpa útlendskar public service-sjónvarpsrásir. |

Sambært § 5 hevur stjórin ábyrgdina av dagliga programmvirkseminum, og stýrið hevur ábyrgdina av, at yvirskipaðu meginreglurnar fyri programmpolitikkinum verða hildnar (public service-eftirlit).

## 3 Sáttmálaásettar public service-skyldur

Sambært § 11 er heimilað landsstýrismanninum at undirskriva ein public service-sáttmála við Kringvarp Føroya eftir orðaskifti í Løgtinginum um ætlaða innihaldið. Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið er ikki ætlanin, at landsstýrismaðurin og Løgtingið skulu leggja seg út í programmábyrgdina hjá stjóranum ella redaksjonella frælsið hjá Kringvarpi Føroya.

Í viðmerkingunum verður víst á, at public service-hugtakið er so breitt, at tað er trupult at røkja allar hugsandi skyldur í senn. Tí verður mett skilagott, at landsstýrismaðurin, sum umboð fyri Løgtingið og fólkið, kann raðfesta og tryggja ávísar nærri allýstar public service-skyldur í einum tíðaravmarkaðum sáttmála. Sum dømi verða nevnd ávís mentanarøki, føroyskt mál, sendingar fyri børn og ung, og at sendingar til ávísan aldursbólk skulu verða týddar til føroyskt. Eisini kunnu mál, tíðarkarmar og vav á eginframleiðslu til sjónvarp verða ásett í sáttmálanum.

## 4 Endamálið við public service

Endamálið við public service-sáttmálanum er at lýsa, hvørjar uppgávur Kringvarp Føroya skal loysa og at lýsa teir karmar, sum public service-virksemið skal virka í.

Tað er av størsta týdningi, at stovnurin megnar at røkja tær uppgávur, ið eru tilskilaðar í sáttmálanum, og hevur fyrilit fyri fólkaræðisligum, samfelagsligum og mentanarligum viðurskiftum, sum viðkoma øllum føroyingum.

Sum ovasta leiðsla fyri Kringvarpi Føroya hevur stýrið ábyrgdina av at hava eftirlit við, at skráin verður løgd til rættis sambært endamálunum, sum eru orðað í kringvarpslógini og public service-sáttmálanum.

Kringvarp Føroya skal í størstan mun tryggja, at tilfarið:

- er óheft av seráhugamálum
- er fjølbroytt og margfalt
- er viðkomandi, álítandi og sakligt, tá talan er um tíðindi og upplýsing annars
- veitir brúkaranum atgongd til týðandi upplýsingar og orðaskifti um avgerandi samfelagsviðurskifti
- vendir sær til nógvar avmarkaðar áhugabólkar og til ein størri skara
- gevur brúkaranum gott innlit
- er dygdargott.

Kringvarp Føroya skal í sendingum og tænastum:

### 4.1 *Styrkja áhuga borgarans at virka í einum fólkaræðisligum samfelag*

Kringvarp Føroya skal tryggja atgongd til týðandi samfelagskunning og kjak.

Kringvarp Føroya skal geva eina haldgóða mynd av nútíðarsamfelagnum og gjøgnum sendingar og tænastur stimbra Føroya fólk í at luttaka í almenna kjakinum. Kringvarp Føroya tryggjar og gevur møguleikar fyri samrøðum og sambondum millum ymiskar bólkar og áskoðanir í samfelagnum.

Kringvarp Føroya skal hava ein virknan leiklut í at tryggja, at nýggju talgildu miðlarnir verða gjørdir atgeingiligir hjá almenninginum. Nýggjar sendingar og kunningartænastur skulu venja brúkaran við nýggju tøknina og geva íblástur til at brúka hana.

Tænastan skal taka støði í samfelagnum og skal endurspegla margfeldi, mentan, ymiskar lívsáskoðanir og livihættir.

Kringvarp Føroya skal sum public service-miðil tryggja ein tíðindaflutning, ið er óheftur av politiskum og handilsligum áhugamálum og áhugabólkum annars.

### 4.2 *Menna føroyska málið og samleika føroyinga*

Málið er týdningarmikil samfelags- og mentanarberi og er grundarlagið undir samleikanum hjá fólkinum. Móðurmálið skal tí røkjast og styrkjast í almenna kringvarpsmiðlinum.

### 4.3 *Stimbra mentan og skapanarevni*

Kringvarp Føroya skal leggja dent á at vera í fremstu røð at miðla mentan, list og mentanararv.

Kringvarp Føroya skal ríka føroyskt mentanarlív við at gera sendingar, ið eru nýskapandi, avbjóðandi og elva til kjak.

### 4.4 *Stimbra vitan og fatan*

Kringvarp Føroya skal stimbra áhuga føroyinga at ogna sær breiða almenna vitan gjøgnum atkomuligt og fólksligt tilfar.

Kringvarp Føroya skal eisini stimbra áhugan fyri okkara alsamt meira altjóðagjørdu verð og soleiðis virka fyri at skapa størri fatan og størri tolsemi mótvegis øðrum mentanum og áskoðanum. Kringvarp Føroya skal tí eisini miðla og viðgera mentan, søgu og samfelagsviðurskifti úr ymsum londum.

# 5 Public service-skyldur

Sáttmálapartarnir eru samdir um, at Kringvarp Føroya í sáttmálaskeiðnum skal miða ímóti at raðfesta og tryggja, at ávísar nærri lýstar public service-uppgávur verða loystar. Talan er bæði um almennar raðfestingar og raðfestingar innan verandi sendingar.

## 5.1 *Almennar raðfestingar, ið eru galdandi fyri allar sendingar*

### 5.1.1 Samskifti við borgaran

Kringvarp Føroya virkar í fólksins tænastu, og tí skal Kringvarp Føroya virka fyri støðugum samskifti við borgaran.

Kringvarp Føroya skal tryggja, at kjak verður við jøvnum millumbilum um innihaldið og endamálið hjá Kringvarpi Føroya.

Góður møguleiki skal vera fyri samskifti umvegis heimasíðu stovnsins. Brúkaranum skal á sjónligum staði standa í boði at siga sína hugsan um tíðindaflutning og programmvirksemi í Kringvarpi Føroya.

### 5.1.2 Føroyskt mál í Kringvarpi Føroya

Tað er lógarásett, at *Kringvarpið eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sending-um, og hevur skyldu at tryggja starvsfólkunum holla málsliga ráðgeving*.

Kringvarpið skal orða ein greiðan málpolitikk, soleiðis at stovnurin kann lúka hesar lógarásetingar og skal knýta málsligan ráðgeva at Kringvarpi Føroya. Stovnurin skal regluliga hava sendingar um mál.

Kringvarp Føroya skal hava ein virknan málpolitikk, ið skal virka fyri at menna føroyska málið, soleiðis at brúkarin upplivir rætt og lætt skilligt mál, ið er livandi í almenna rúminum. Aðalmálið er, at allar sendingar, ið Kringvarp Føroya framleiðir, eru á góðum føroyskum máli.

### 5.1.3 Týtt tilfar

Størsti parturin av tilfarinum, ið verður sent í sjónvarpinum, er útlendskt. Barnasendingar eru týddar til føroyskt ella hava føroyska talu. Harafturímóti er ikki vanligt, at sendingar til vaksin verða tekstaðar til føroyskt. Sjónvarpið er sostatt fyri ein stóran part grundað á annað mál enn føroyskt. Málið er oftast danskt ella enskt/amerikanskt. At byrgja fyri teimum fylgjum, hetta hevur við sær, eigur útlendskt tilfar, innan ásettar karmar, at verða ljóðsett við føroyskari talu ella tekstað á føroyskum máli. Hetta fer væntandi at gera tað, at føroyingar fara at lesa nógv meiri tekst á føroyskum, og hetta kann vera við til at bøta um lesiførleikan, serstakliga hjá unga ættarliðnum.

### 5.1.4 Alnets-tænastur

Kringvarp Føroya skal gagnnýta alnetið til innihald og tænastur, ið samsvara við public service-skyldurnar. Heimasíðan hjá Kringvarpi Føroya skal kunna nýtast sum samskiftis- og tænastumiðil. Hon skal fevna um tíðindi og aktuelt, mentan, tilfar til børn og ung, undirvísing og annað viðkomandi. Heimasíðan røkkur sum miðil bæði brúkarum í Føroyum og uttanlands.

Kringvarp Føroya skal senda útvarpssendingar beinleiðis á alnetinum. Allar útvarpssendingar, tónleikasendingar undantiknar, skulu leggjast á alnetið.
Heimasíðan skal fevna um undirvísingartænastu, sum sostatt eisini verður ein tænasta fyri føroyingar, sum búgva uttanlands.

Kringvarp Føroya samskipar talgilt føroyskt tilfar til børn, so at tað verður lætt atkomuligt hjá føroyingum, ið búgva uttanlands.

### 5.1.5 Keypa tænastur

Kringvarp Føroya eigur at nýta ein lutfalsliga størri part av fíggjarætlanini at keypa tænastur uttanhýsis, soleiðis at marknaðurin verður gagnnýttur á bestan hátt. Fríyrkisfólk hava tá møguleika at bjóða seg fram og menna sín serkunnleika .

### 5.1.6 Tilbúgving

Sum ásett í kringvarpslógini hevur Kringvarp Føroya skyldu til at taka lut í almennum tilbúgvingarskipanum. Hetta merkir, at Kringvarp Føroya skal varpa boð, ið hava týdning fyri tilbúgvingina til Føroya fólk.

### 5.1.7 Førleikamenning og dygd

Kringvarp Føroya skal stremba eftir at skapa eitt mennandi og áhugavert arbeiðsumhvørvi, har faklig dygd og kritiskur journalistikkur verða raðfest ovarlaga, og stovnurin skal miða ímóti at vera tann fjølmiðil í Føroyum, ið hevur stórst trúvirði. Kringvarp Føroya skal vera við til at menna føroyskan journalistikk t.d. í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya.

## 5.2 *Raðfestingar innan ávísar bólkar av sendingum*

### 5.2.1 Tíðindi og aktuelt

Tíðindaflutningurin í Kringvarpi Føroya skal vera óheftur av politisku skipanini og seráhugamálum annars og eigur at verða varpaður so sjálvstøðugt og fjølbroytt sum møguligt úr ymsum sjónarhornum í ymsu miðlunum, t.e. í sjónvarpsmiðlinum, í útvarpsmiðlinum og í alnetsmiðlinum. Dagførd tíðindi skulu støðugt verða løgd út á heimasíðuna hjá Kringvarpi Føroya.

Tíðindi í Kringvarpi Føroya skulu leggja upp til aktualitetssendingar, eitt nú perspektiverandi uppfylgingar, greinandi tíðindaflutning og kjak.

Tað skal vera tryggjað í leiðslubygnaðinum hjá Kringvarpi Føroya, at í minsta lagi tvær tíðindaredaksjónir (ein fyri útvarpsmiðilin og ein fyri sjónvarpsmiðilin) virka óheftar av hvørji aðrari hvønn dag, og at redaktørarnir á tíðindaredaksjónunum hava ábyrgd av tíðindadegnum og leiða redaksjónsfundirnar.

### 5.2.2 Mentan

Kringvarp Føroya skal gera sendingar, sum skjalprógva samtíð okkara, og sum kunnu standa sum varandi virði fyri eftirtíðina.

Í skránni skal Kringvarp Føroya endurspegla gerandisdagin og veruleikan hjá føroyingum í øllum sínum fjølbroytni, eitt nú innan átrúnað, livihátt, frítíð, arbeiðs- og familjulív.

Miðast skal ímóti at framleiða og varpa sendingar um serføroysk viðurskifti innan náttúru og mentan, eitt nú føroyskan dans, føroyskt handverk og føroyskt djóra- og plantulív.

#### 5.2.2.1 List

Kringvarp Føroya skal endurspegla og viðgera føroyska list í øllum sínum fjølbroytni og listagreinum.

#### 5.2.2.2 Drama

Kringvarp Føroya skal virka fyri at menna og senda útvarps- og sjónvarpsdramatikk. Stovnurin skal eisini stuðla uppundir, at okkara skrivandi fólk verða eggjað til at skriva dramatikk til útvarp og sjónvarp. Kringvarp Føroya samstarvar við avvarðandi partar um framleiðslu av sjónvarps-dramatikki.

#### 5.2.2.3 Bókmentir

Kringvarp Føroya skal miða ímóti at viðgera og skifta orð um ymiskar bókmentir og miðla bæði føroyskar og útlendskar bókmentir til lurtaran/hyggjaran. Kringvarp Føroya skal, har tað ber til, brúka yrkislærdar sjónleikarar sum upplesarar.

#### 5.2.2.4 Undirhald

Ein týðandi táttur í virkseminum hjá Kringvarpi Føroya er at senda undirhald fyri alla familjuna. Tað eigur at fevna breitt um skemt og speisemi, frítíð og ítriv og kappingar. Kringvarp Føroya skal í sáttmálaskeiðinum leggja seg eftir at framleiða undirhaldssendingar, ið fanga og endurspegla heimliga speisemið og skemtingarlyndið. Í skemti ella speisemi, ið sprettur úr aktuellum ráki ella tí, ið fyriferst, ber eisini til at eggja og arga, flyta mørk og elva til kjak.

### 5.2.3 Átrúnaður

Kringvarp Føroya skal stimbra kjak og viðgerð av andaligum og átrúnaðarligum fyribrigdum, ið hava við tilveru okkara at gera. Varpað verður regluliga frá guðstænastum og møtum.

### 5.2.4 Ítróttur

Kringvarp Føroya skal leggja seg eftir at viðgera ítrótt úr forkunnugum sjónarhornum. Kringvarp Føroya skal eisini hava vakið eygað við, tá okkara ítróttarfólk gera seg galdandi í altjóða kappingum, eisini um tey umboða annað land.

Kringvarp Føroya skal á fjølbroyttan hátt viðgera ymsu ítróttargreinirnar. Beinleiðis frásagnir eru ein týðandi partur av ítróttartilfarinum í Kringvarpi Føroya.

### 5.2.5 Børn og ung

Kringvarp Føroya skal leggja doyin á at hava gott tilfar til børn og ung. Hetta skal gerast við at miðla sendingar og nýggjar tænastur.

Kringvarp Føroya skal gera dygdargóðar sendingar til børn og ung. Í barnasendingunum skal Kringvarp Føroya lata ein part av innihaldinum vera úr føroyskum jørðildi, soleiðis at børnini kenna seg aftur í einum føroyskum veruleika. Kringvarp Føroya skal miða ímóti at geva børnunum møguleika at kenna tað, sum er heimligt, samstundis sum tey verða kunnað um tað, sum onnur seta høgt. Kringvarp Føroya skal venja børnini til at hugsa sjálvstøðugt og sjálv at meta um dygdir og ódygdir.

Størri dentur skal leggjast á gott tilfar til føroyskan ungdóm, sum eggjar ungdóminum at taka lut í samfelagsgongdini á fólkaræðisligan hátt. Somuleiðis skulu tey ungu menna seg til at kjakast um og taka støðu til viðurskifti, sum ávirka teirra gerandisdag. Ein partur av innihaldinum skal tí hava støði í gerandisdegnum hjá føroyskum ungdómi og í innihaldi, sum tey ungu kenna seg aftur í.

Kringvarp Føroya skal tryggja, at filmar, ið verða sýndir, eru flokkaðir samsvarandi lógini um miðlaráð til verju fyri børn og ung, t.e. antin eru aldursmerktir í einum av londunum, sum eru viðurkend í kunngerð nr. 73 frá 1. juni 2008 ella aldursmettir av Miðlaráðnum. Flokkingin skal týðiliga tilskilast sum ásett í § 8, stk. 2 í lógini um miðlaráð til verju fyri børn og ung.

### 5.2.6 Tónleikur

Kringvarp Føroya skal sum mentanarstovnur miðla tónleik og skapa áhuga fyri og eggja til, at framleiddur verður føroyskur tónleikur.

Kringvarp Føroya skal eggja til, taka stig til og/ella leggja til rættis føroysk tónleikatiltøk, sum menna tónlistamentanina, bæði tá talan er um føroyskan sang og dans og føroysk kvæði, klassiskan tónleik, kórtónleik, populertónleik o.a.

Føroyskur tónleikur hevur eitt týðandi pláss í útvarpsmiðlinum.

Útvarpsmiðilin skal geva rúmd fyri tónleiki innan allar tónleikagreinir. Kringvarp Føroya skal orða ein greiðan tónleikapolitikk, sum hevur fyrilit fyri býtinum millum føroyskan og útlendskan tónleik, ymsu tónleikagreinirnar, nýggjan og eldri tónleik o.s.fr.

Sjónvarpsmiðilin tekur stig til at skipa fyri konsertum við føroyskum tónleikarum.

### 5.2.7 Undirvísing

Kringvarp Føroya skal senda og endurvarpa sendingar, sum mugu metast at hava varandi undirvísingar- og upplýsingarvirði, eitt nú sendingar um mál, list, søgu og mentan heima og heiman.

Kringvarp Føroya kann taka upp samstarv við viðkomandi undirvísingar- og mentanarstovnar í sambandi við innihald, framleiðslu og kunning um undirvísingartilfar.

### 5.2.8 Tænastur til fólk við breki

Kringvarp Føroya skal tryggja fólki við breki ávísar tænastur. Public service-tænastur til deyv og hoyriveik skulu styrkjast.

Tíðindi skulu teknmálstulkast, tá tey verða send fyrstu ferð ella í seinasta lagi dagin eftir.

Sendingar, ið hava stóran samfelagsáhuga og –týdning, skulu tekstast og/ella teknmálstulkast, eitt nú valsendingar í sambandi við løgtingsval.

Miðað eigur at vera ímóti at veita einfaldar alnetstænastur til fólk við sjón- ella hoyribreki.

### 5.2.9 Sendingar úti um landið

Kringvarp Føroya skal regluliga varpa ljós á tað, sum hendir í øllum Føroyum og eisini varpa ljós á vinnu- og mentanarlívið kring landið. Í sendingum úti um alt landið verða staðbundin fyribrigdi og sermerki lýst.

Tøkniliga ber tað til hjá Kringvarpi Føroya at senda beinleiðis úr nógvum plássum í landinum. Hetta gevur nakrar møguleikar, sum Kringvarp Føroya skal brúka á skynsaman hátt.

# 6 Verandi inntøkustøði og raðfestingar

Í sambandi við tilgongdina at gera ein public service-sáttmála hevur Kringvarp Føroya við støði í roknskapar- og virksemistølum fyri 2009 lýst sítt virksemi bæði í krónum og í senditíð:

| | Sjónvarp | | | Útvarp | | | Íalt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ***2009 sendistøða:*** | ***tkr.*** | *%* | ***tímar*** | ***tkr.*** | *%* | ***tímar*** | ***tkr.*** | ***tímar*** |
| Tíðindi og aktuelt | 7.419 | *41%* | *98* | 4.634 | *36%* | *407* | 12.053 | *505* |
| Mentan | 4.002 | *22%* | *48* | 4.830 | *38%* | *1.241* | 8.831 | *1.289* |
| Átrúnaður | 747 | *4%* | *61* | 376 | *3%* | *127* | 1.123 | *188* |
| Ítróttur | 2.622 | *14%* | *61* | 545 | *4%* | *150* | 3.167 | *211* |
| Børn og ung | 2.436 | *13%* | *38* | 1.191 | *9%* | *121* | 3.627 | *159* |
| Tónleikur | 120 | *1%* | *8* | 779 | *6%* | *833* | 899 | *841* |
| Undirvísing | 470 | *3%* | *16* | | | | 470 | *16* |
| Tænastur til fólk við breki | 467 | *3%* | *61* | | | | 467 | *61* |
| Sendingar úti um landið | | | | 201 | *2%* | *80* | 201 | *80* |
| Skrá/kunngerðir/dagsetur | | | | 201 | *2%* | *260* | 201 | *260* |
| **Beinleiðis útreiðslur** | **18.283** | *100%* | ***391*** | **12.758** | *100%* | ***3.219*** | **31.042** | ***3.610*** |
| | | | | | | | | |
| **Óbeinleiðis útreiðslur** | | | | | | | **29.500** | |
| | | | | | | | | |
| **Íalt** | | | | | | | **60.541** | |

Í talvuni sæst, at av samlaðu beinleiðis útreiðslunum í 2009 á góðar 31 mió.kr, fóru 18,3 mió.kr. (59,0%) til sjónvarpssendingar og 12,8 mió.kr. (41,3%) til útvarpssendingar. Óbeinleiðis útreiðslurnar eru roknaðar til 29,5 mió.kr.

Talvan lýsir, hvørjar beinleiðis útreiðslur fara til at framleiða ávísu sendingarnar. Talan er ikki um senditímar, men um tímar til at framleiða sendingar. Tímatølini innihalda sostatt ikki útlendskar sendingar, filmar, tónleik og endursendingar.

## 6.1 *Kostnaður í 2009 til at framleiða sjónvarpssendingar*

Nógv tær størstu útreiðslurnar fara til at framleiða "Tíðindi og aktuelt" (40,7%) og ítróttarsendingar (14,2%). Tilsamans verður umleið helvtin av framleiðsluútreiðslunum nýtt til hesar báðar bólkar. 22% av útreiðslunum fara til mentan, og 13,4% til børn og ung.

## 6.2 *Kostnaður í 2009 til at framleiða útvarpssendingar*

Tá talan er um útvarp, fer áleið tann sama nøgdin av framleiðsluútreiðslunum til "Tíðindi og aktuelt" (36%) og mentan (37,6%). Børn og ung eru 9,3%, tónleikur 6% og ítróttur 4,3%.

## 6.3 *Væntað framleiðsla í 2010*

Kringvarp Føroya metir, at lutfalsliga býtið millum sendingarnar í 2010 er á leið tað sama sum fyri 2009.

Inntøkurnar í hálvársroknskapinum fyri 2010 eru 3,56 mió kr. lægri enn sama tíðarskeið 2009.

Kringvarpsgjaldið er 961 t.kr. hægri. Kringvarp Føroya er í ferð við at skráseta fleiri gjaldarar, nú Løgtingið hevur samtykt nýggju lógina, har øll hava skylda til at gjalda kringvarpsgjald.

Lýsingarnar eru í minking. Talan er um 1,1 mió.kr. minni í lýsingarinntøkum enn í sama tíðarskeiði í 2009.

Viðvíkjandi spølunum er inntøkan lækkað 3,5 mió.kr, V4 193 t.kr. og Gekkurin 3,3 mió.kr. Vert er at viðmerkja, at í fyrra hálvári í 2009 var Gekkurin óvanliga stórur, av tí at eingin vann Gekkin fleiri vikur á rað.

Um ikki ber til at økja um inntøkurnar seinna hálvár, so eru skerjingar í sendiflatuni í væntu.

## 6.4 *Óbeinleiðis útreiðslur*

Samlaðu útreiðslurnar í 2009 vóru 60,4 mió.kr. Í eksterna roknskapinum eru útreiðslurnar býttar upp í beinleiðis kostnað (27,7 mió.kr.) og aðrar útreiðslubólkar í óbeinleiðis útreiðslum á 32,3 mió. Óbeinleiðis útreiðslurnar í talvuni omanfyri eru settar til góðar 29,5 mió.kr. Munurin í tølumum á 2,8 mió kr. stavar í høvuðsheitum frá, at parturin av eftirløn o.l. hjá starvsfólki, ið framleiða sendingar, er roknaður sum beinleiðis útreiðsla.

Talvan niðanfyri vísir ein samandrátt av útreiðslunum í eksterna roknskapinum, har útreiðslurnar eisini eru gjøllari greinaðar í notum:

| **2009** | **(mió.kr.)** | |
|---|---|---|
| Beinleiðis kostnaður | | 27,7 |
| Umsiting: | | |
| - Umsiting og stýrið | 7,4 | |
| - Teknisk deild | 8,0 | 15,4 |
| Annar kostnaður: | | |
| - Kostnaður fyri rættindi | 3,9 | |
| - Ferðakostnaður | 0,6 | |
| - Útbúgving og førleikamenning | 1,7 | |
| - Eftirløn, frítíðarløn og marknaðargjøld | 7,1 | 13,4 |
| Íløgur og størri viðlíkahald | | 3,3 |
| Avskrivingar av skuldarum | | 0,4 |
| Nettorentur | | -0,2 |
| **Íalt** | | **60,0** |

## 7 Útlitini fyri øktum inntøkum

Í talvuni niðanfyri er ein samandráttur av roknskapartølunum fyri 2009 og fyrru helvt av 2010 og metingar av roknskapartølunum fyri seinnu hálvu 2010 og fyri 2011 (mió.kr.).

| | **Roknskapur 2009** | **Roknskapur jan.-juni 2010** | **Roknskapur 2010 (meting)** | **Meting 2011** |
|---|---|---|---|---|
| Kringvarpsgjald | 41,9 | 21,6 | 46,5 | 48,4 |
| Lýsingar og kunngerðir | 8,8 | 3,6 | 8,7 | 10,4 |
| Spæliinntøkur | 7,2 | 1,9 | 4,0 | 6,9 |
| Aðrar inntøkur | 1,2 | 0,1 | 0,4 | 0,3 |
| **Inntøkur tilsamans** | **59,1** | **27,1** | **59,6** | **66** |
| | | | | |
| Lønir og samsýningar | 42,8 | 20,4 | 41,3 | 41,3 |
| Annar rakstrar-kostnaður | 13,8 | 8,4 | 15,6 | 20,6 |
| Íløgur og avskrivingar | 3,3 | 1,9 | 2,9 | 3,9 |
| Nettorentur | 0,2 | 0 | -0,2 | 0,2 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **60,1** | **30,7** | **59,6** | **66** |
| | | | | |
| **Rakstrarúrslit** | **-0,6** | **-3,6** | **0** | **0** |
| Starvsfólkatal | 84 | 84 | 85 | 85 |

Í 2010 og 2011 er roknað við vøkstri í kringvarpsgjaldinum. Hesin vøkstur byggir m.a. á, at tað verða munandi betri møguleikar at krevja inn kringvarpsgjaldið. Nógv húski rinda ikki kringvarpsgjald, og tí varð í mai 2010 ein lógarbroyting framd í § 7 í kringvarpslógini, ið bøtir um innkrevjingarmøguleikarnar.

Hvørt húskið verður at rinda eitt samlað kringvarpsgjald fyri tænasturnar hjá Kringvarpi Føroya í miðlunum, sum í dag eru útvarp, sjónvarp og internet.

Ásannandi at Kringvarp Føroya ikki hevur nóg neyvt yvirlit yvir húskini í landinum, fær Kringvarp Føroya møguleika til eisini at nýta skrá hjá Posta yvir húski, ið móttaka post, og skrá hjá SEV yvir húski, ið hava málarar, sum grundarlag at krevja inn eftir. Eins og í gomlu lógini kunnu eftirstøður verða kravdar inn við panting.

Í talvuni omanfyri er roknað við, at kringvarpsgjaldið 2010 hækkar við umleið 4 mió.kr.
Um samanborið verður við tal á húskjum, sum Posta og SEV hava í sínum skráum, rinda fleiri túsund húski í dag ikki kringvarpsgjald. Lógarbroytingin og at Kringvarp Føroya bøtir um innkrevjingina, gera tað møguligt hjá Kringvarpi Føroya at hækka inntøkurnar uttan at hækka kringvarpsgjaldið.

Sum sæst í talvuni, verður mett, at spæliinntøkurnar í 2010 minka góðar 3 mió.kr., m.a. av tí at áhugin fyri V4 er so nógv minkaður. Eydnast tað Kringvarpi Føroya at vekja áhuga millum fólk fyri einum alternativum spæli, er møguleiki fyri, at spæliinntøkurnar hækka aftur í 2011.

# 8 Raðfestingar, treytaðar av hægri inntøkum

Inntøkurnar hjá Kringvarpi Føroya í 2009 og 2010 liggja um einar 60 mió. kr. Hesin parturin av sáttmálanum snýr seg um meira ítøkiliga at raðfesta, hvørjar public service-skyldur skulu verða raðfestar, um inntøkurnar hjá Kringvarpi Føroya verða hægri í sáttmálaskeiðnum enn 60 mió. kr. í 2009 og 2010. Hesar raðfestingar eru settar upp í hjálagda yvirlit, sum í stigum vísir, hvørjar public service-tænastur verða raðfestar um inntøkurnar hækka stigvíst.

Tað hevur stóran týdning at raðfesta sendingar, sum venda sær til unga ættarliðið hægri fyri at fáa børn og ung at kenna seg sum føroyingar í einum føroyskum samleika. Málsliga ávirkanin uttanífrá er stór, og tí skal dentur eisini verða lagdur á at vekja ans fyri móðurmálinum. Semja er um at raðfesta "Børn og ung" ovarlaga.

Kringvarp Føroya er týdningarmiklasti mentanarberi føroyinga, og public service-skyldurnar á hesum øki eru nógvar og fjølbroyttar. Tað er ikki vanligt, at sendingar til vaksin verða tekstaðar. Ætlanin er, at útlendskt tilfar í størri mun skal verða ljóðsett við føroyskari talu ella tekstað á føroyskum máli.

Viðvíkjandi tíðindum og aktuelt verður serligur dentur lagdur á kjaksendingar og sendingar, har farið verður í dýpdina.

## 8.1 *Raðfestingarskjal*

Í raðfestingarskjalinum niðanfyri er yvirlit, ið vísir, hvørjar public service-tænastur, ið møguligar vaksandii inntøkur stigvíst skulu fíggja. Partarnir eru samdir um yvirskipaðu raðfestingarnar, men leggja samstundis dent á, at tað er kringvarpsstjórin, sum tekur endaliga avgerð um, júst hvørjar sendingar, talan verður um. Stjórin hevur ábyrgdina av skránni, og Kringvarp Føroya hevur frælsi til at leggja innihaldið til rættis.

## 8.2 *Viðmerkingar til raðfestingarskjal*

Heitini á teim ymsu sendingunum í raðfestingarskjalinum eru talmerkt, og í einum fylgiskjali niðanfyri eru heitini gjøllari greinað. Hetta er gjørt fyri at geva eina hóming av, hvørjar sendingar talan kann verða um undir teimum ymsu yvirskriftunum.

## 8.3 *Miðlasavnið*

Í kringvarpslógini er ásett um miðlasavnið:

**§ 15.** Kringvarp Føroya hevur skyldu at goyma eintak av allari eginframleiðslu. Hetta tilfar verður goymt í miðlasavni, ið verður knýtt at Kringvarpi Føroya. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um skipan og rakstur av miðlasavninum.
*Stk. 2.* Miðlasavnið kann taka ímóti og varðveita talgilt tilfar (savnindi) frá almennum og privatum stovnum eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri varðveiting av talgildum tilfari sbrt. stk. 2 og atgeingi til hetta tilfar.

Kringvarp Føroya hevur bygt upp eitt savn, ið er ein týðandi partur av mentanararvinum, og tí skal tryggjast, at alt sent tilfar í framtíðini verður varðveitt og skrásett.

Kringvarp Føroya skal virka fyri at halda savnið á einum tryggum og dagførdum stigi.

Savn Kringvarpsins skal latast upp fyri brúkaranum. Málið er, at sum mest av tí, ið er framleitt í Kringvarpi Føroya, Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya gjøgnum árini verður atkomuligt hjá brúkaranum umvegis alnetið. Fyrilit skulu havast fyri upphavsrættinum.

## 9 Árlig frágreiðing um virksemið sambært sáttmálanum

Stjórin í Kringvarpi Føroya skal á hvørjum ári fyri 1. apríl skriva eina frágreiðing, ið vísir í hvønn mun public service-skyldurnar, ásettar í hesum sáttmála, eru hildnar undanfarna árið. Frágreiðingin skal í høvuðsheitum fylgja uppsetingini í hesum sáttmála. Eru ásetingarnar ikki hildnar, skal stjórin gjølla greiða frá orsøkini og t.d. vísa á, hvussu ætlanin er at halda public service-skyldurnar restina av sáttmálaskeiðnum.

Frágreiðingin verður latin stýrinum fyri Kringvarp Føroya, ið hevur eftirlit við, at public service-sáttmálin verður hildin. Eftir at frágreiðingin er viðgjørd letur stýrið í seinasta lagi 1. mai lands-stýrismanninum í mentamálum frágreiðingina saman við viðmerkingum og fráboðanum um, hvørji tiltøk ætlanin er at seta í verk, um so er, at sáttmálin á týðandi økjum ikki er hildin.

Við støði í frágreiðingini kunnu partarnir í hesum fyrsta sáttmálaskeiðnum eftirmeta sáttmálan og gera neyðug ískoyti.

# 10 Raðfestingarskjal

| | | Sjónvarp | | Útvarp | | Íalt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Fyrstu fýra mió.:** | ***tkr.*** | ***Tímar*** | ***tkr.*** | ***tímar*** | ***tkr.*** | ***tímar*** | |
| 0 | *Børn – røddir* | 300 | *10* | | | 300 | *10* | Børn og Ung |
| 0 | *Sunnukvøldssendingar* | 400 | *5* | | | 400 | *5* | Mentan |
| 0 | *Mentanartíðindi í svf* | 880 | *11* | | | 880 | *11* | Mentan |
| 0 | *Kjak í sjónvarpi* | 400 | *6* | | | 400 | *6* | Tíðindi og aktuelt |
| 1 | *2 djúptøknar sendingar til útvarp* | | | 460 | *57* | 460 | *57* | Mentan, tíðindi og aktuelt |
| 2 | *Før. tekstur og tala til vaksin* | 200 | *30* | | | 200 | *30* | Mentan |
| 3 | *Ungdómur sjónvarp/web* | 360 | *5* | | | 360 | *5* | Børn og Ung |
| | **Næstu tríggjar mió.:** | | | | | | | |
| 0 | *Børn – røddir* | 200 | *7* | | | 200 | *7* | Børn og Ung |
| 0 | *Sunnukvøldssendingar* | 400 | *5* | | | 400 | *5* | Mentan |
| 0 | *Mentanartíðindi í svf* | 200 | *4* | | | 200 | *4* | Mentan |
| 0 | *Kjak í sjónvarpi* | 400 | *6* | | | 400 | *6* | Tíðindi og aktuelt |
| 1 | *3 djúptøknar sendingar til útvarp* | | | 694 | *85* | 694 | *85* | Mentan, tíðindi og aktuelt |
| 2 | *Før. tekstur og tala til vaksin* | 200 | *30* | | | 200 | *30* | Mentan |
| 3 | *Ungdómur sjónvarp/web* | 360 | *5* | | | 360 | *5* | Børn og Ung |
| 5 | *Ungdómur útvarp/web* | - | - | 574 | *57* | 574 | *57* | Børn og Ung |
| | **Næstu tríggjar mió.:** | | | | | | | |
| 4 | *D&V mikudag* | 1.501 | *17* | | | 1.501 | *17* | Tíðindi og aktuelt |
| 0 | *Brúkarasending* | 500 | *6* | | | 500 | *6* | Tíðindi og aktuelt |
| 2 | *Før. tekstur og tala til vaksin* | 400 | *60* | | | 400 | *60* | Mentan |
| 8 | *Lívsstílssending* | 600 | *8* | | | 600 | *8* | Mentan |
| | **Næstu tríggjar mió.:** | | | | | | | |
| 3 | *Ungdómur sjónvarp/web* | 360 | *5* | | | 360 | *5* | Børn og Ung |
| 7 | *Brúkarasending* | 500 | *6* | | | 500 | *6* | Tíðindi og Aktuelt |
| 8 | *Lívsstílssending* | 600 | *8* | | | 600 | *8* | Mentan |
| 11 | *Undirhald* | 1.136 | *13* | | | 1.136 | *13* | Mentan |
| 0 | *Kjak í sjónvarpi* | 400 | *6* | | | 400 | *6* | Tíðindi og Aktuelt |
| | **Næstu tríggjar mió.:** | | | | | | | |
| 7 | *Brúkarasending* | 500 | *6* | | | 500 | *6* | Mentan |
| 9 | *D&V vikuskiftið* | 1.674 | *18* | | | 1.674 | *18* | Tíðindi og Aktuelt |
| 2 | *Før. tekstur og tala til vaksin* | 400 | *60* | | | 400 | *60* | Mentan |
| 10 | *Átak (oyggjl/prix FØ)* | 500 | *7* | | | 500 | *7* | Mentan |
| | **Næstu tríggjar mió.:** | | | | | | | |
| 12 | *Børn* | | | 575 | *57* | 575 | *57* | Børn og Ung |
| 9 | *D&V vikuskiftið* | 1.674 | *18* | | | 1.674 | *18* | Tíðindi og Aktuelt |
| 8 | *Lívsstílssending* | 750 | *10* | | | 750 | *10* | Mentan |
| | **Næstu tríggjar mió.:** | | | | | | | |
| 6 | *Nýggj útvarpsrás* | | | 2.000 | | 2.000 | - | Alt |
| 10 | *Átak (oyggjl/prix FØ)* | 400 | *5* | | | 400 | *5* | Mentan |
| 0 | *Sunnukvøld* | 600 | *8* | | | 600 | *8* | Mentan |
| | | **16.795** | ***385*** | **4.503** | ***256*** | **21.098** | ***641*** | ***t*** |

## 11 Viðmerkingar til raðfestingarskjal

***0. Sendingar, sum vórðu tiknar av í 2009***
Í sambandi við, at virksemi í Kringvarpi Føroya varð skert, vórðu samlaðu útreiðslurnar í 2009 lækkaðar uml. 8 mió. kr. Tí eru fleiri sendingar í 2008, svarandi til einar 5 mió. kr., tiknar av í 2009. Talan er bæði um "Børn og ung", "Mentan" og "Tíðindi og aktuelt", her serliga kjaksendingarnar. Um so er, at inntøkurnar verða nakað hægri, er ætlanin at raðfesta soleiðis, at tílíkar sendingar verða aftur at síggja, t.d. nakrar barnasendingar, mentanartíðindi og kjaksendingar.

***1. Djúptøknar sendingar til útvarp***
Her verður hugsað um sendingar, har farið verður í dýpdina. Dømi eru sendingar sum "Skannarin", "Kjakaríið", "Fimmarin", "62 norður" o.s.fr.
Tað hevur avgerandi týdning fyri fólkaræðið og vitanina hjá Føroya fólki at farið verður afturum, og at mál verða lýst til fulnar. Í hesum sendingum er møguligt at fara nágreiniligari til verka enn í einari
tíðindasending.

***2. Føroyskur tekstur og føroysk tala til vaksin***
Her er talan um dagliga at hava 3 tímar av útlendskum tilfari, ið er føroyskað við føroyskari talu og føroyskum teksti.
Grundgevingarnar eru:
Tástani kunnu vit tosa um, at vit hava eitt veruligt føroyskt sjónvarpstilboð, har einki verður víst, uttan so at tað er føroyskað.
Tann vanligi føroyingurin fer at uppliva hetta sum føroyskar sendingar.
Tann vanligi føroyingurin fer at lesa rætt stavaðan tekst á sjónvarpsskíggjanum hvønn dag.
88% av Føroya fólki hava longu sæð ein stóran part av sendingunum við útlendskum teksti og talu á einari aðrari rás, í høvuðsheitum á rásum hjá DR.

***3. Ungdómur sjónvarp/web***
Ungdómurin hevur ikki verið raðfestur serliga høgt. Tað hevur stóran týdning at fáa ungdómin við, tí hann skal mynda Føroyar í framtíðini.
Grundgevingarnar eru:
Málsliga ávirkanin á ung er risastór í einum altjóðagjørdum samfelag.
Fyri at fáa ungdómin at kenna seg sum føroyingar við einum føroyskum samleika.
At viðgera tilfar, ið gevur ungdóminum áhuga í sendingum á móðurmálinum.
Ávirkanin uttaneftir hevur verið stór síðstu árini, og um ikki nakað munagott verður gjørt, so er ikki vist, at hetta ættarliðið kemur at taka Kringvarpið til sín seinni.

***4. Dagur og vika mikudag***
Tað verður mett sum eitt minstakrav at hava eina tíðindasending hvønn gerandisdag í árinum.
Tað verður ringt at rópa tað fyri tíðindi, um sendingin manglar ein gerandisdag.

***5. Ungdómur útvarp/web***
Fleiri sendingar til børn kundu fingið børnini at tikið útvarpið til sín og kundu, sum tey vaksa til, verið við til at kveikt áhuga teirra fyri ungdómssendingum.

***6. Nýggj útvarpsrás***
Ein útvarpsrás afturat hevði givið Kringvarpinum høvi at gingið ynskjunum hjá lurtarunum á møti. Eisini hevði tað givið Kringvarpinum møguleika at endursent nógv fleiri sendingar úr savninum.Tónleikurin kundi eisini verið tillagaður til lurtaran.

***7. Brúkarasending***
Í bronsumodellinum eru 18 sendingar (RIST), og verða brúkarasendingarnar her víðkaðar til at vera hvørja viku, uttan í feriutíð. Grundgevingarnar eru:
Brúkarin í Føroyum hevur tørv á at fáa upplýsing um vørurnar á føroyskum og við støði í føroyskum viðurskiftum.
Ristsendingarnar, ið hava verið á sjónvarpsmiðlinum, høvdu risastóran áhuga millum vanlig fólk í Føroyum.
Føroyar hava akkurát fingið nýggja marknaðarføringarlóg og egnan brúkaraumboðsmann.

***8. Lívsstílssending***
Í vesturheiminum eru vit  alsamt meiri tilvitað um livihátt ella lívsstíl, men hóast hetta eru lívsstíls- ella vælferðarsjúkur vorðnar vanligar, og upplýsing kring hetta er alneyðug.
Grundgevingarnar eru:
Føroyingar hava tørv á kunnandi sendingum um lívsstíl í Føroyum og á føroyskum. Á henda hátt ber eisini til at sammeta lívsstíl og rák aðrastaðni við lívsstíl og rák í Føroyum.

***9. Dagur og vika um vikuskiftið***
Málið er, at Føroya fólk fær tíðindi hvønn dag í sjónvarpi.
Grundgevingarnar eru:
Ein hending, ið hevur eitt tíðindavirði, kann akkurát tað sama henda um vikuskiftið.
Vikuskiftið kann eins og aðrastaðni eisini nýtast til, at tíðindi verða meiri perspektiverandi.

***10. Átak (oyggjaleikir / Prix Føroyar)***
Í bronsumyndlinum er møguleiki fyri at gera eina bíliga útgávu, t.d. í útvarpi ella avmarkað sjónvarp við innsløgum í t.d. 3-2. Hetta er ein víðkaður myndil, har grundgevingarnar eru:
Alt Føroya fólk kann vera við beinleiðis í sjónvarpi.
Royndirnar, ið Kringvarpið hevur av at varpa slík tiltøk í sjónvarpið, eru, at nógv talent fáa eitt startskot til at koma víðari og seinni vera virðilig umboð fyri Føroya land.

***11. Undirhald***
Undirhald í sjónvarpi hevur ikki verið raðfest høgt og hevur tí ført við sær, at føroyingar hava hugt eftir donskum undirhaldi. X-faktor er eitt gott dømi. Grundgevingarnar eru:
Undirhald kann savna eina heila tjóð.
Føroyskt skemt er serføroyskt.
Skemt kann vera samfelagsrevsandi.
Skemt kann viðgera evni, ið annars eru ring at viðgera.

***12. Børn***
Møguleiki fyri at víðka talið av sendingum og tænastum til børn. Við rúgvismiklum og góðum tilfari til børn kann Kringvarpið veruliga gera mun.